# LÓGGÁVA BÚGVIN TIL TALGILDING?

LÓGARTÆNASTAN
2. útgáva - oktober 2025

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 11**

# Lóggáva búgvin til talgilding?

Nógv verður tosað um talgilding, og skjótt verða óivað fleiri av okkara arbeiðsuppgávum automatiseraðar ella talgildar. Spurningurin er, um lóggávan megnar at fylgja við hesi stóru menningini í tøknini. Hvussu tryggja vit okkum, at lóggávan er nøktandi, tá ið umheimurin, sum skal stýrast, alla tíðina broytist?

Hvat verður hugsað um, tá ið vit siga, at lóggávan skal vera búgvin til talgilding? Er tað, at lóggávan skal kunna umsitast talgilt? Ella er tað, at lóggávan heimilar, at samfelagið verður talgilt? Hetta eru tvey sera ymisk sjónarmið um talgildingarbúna lóggávu.

## 1. Avgerandi markið: talgilding av lóggávuni ella lóggáva, sum stuðlar undir talgilding í samfelagnum

Fyrst av øllum mugu vit gera okkum greitt, hvat endamálið skal vera við eini talgildingarbúnari lóggávu. Er endamálið, at lóggávan ella myndugleikaumsitingin í sjálvum sær skal talgildast? Ella er endamálið, at lóggávan skal seta karmarnar fyri, at samfelagið kann gagnnýta møguleikarnar við talgilding betur?

Fyritreytirnar fyri eini talgildingarbúnari lóggávu, skilt sum lóggáva, sum skal umsitast talgilt, eru heilt øðrvísi enn neyðugu fyritreytirnar fyri talgildingarbúnari lóggávu, skilt sum lóggáva, sum ger ta tøkniligu menningina í samfelagnum møguliga, tvs. lóggáva, sum stuðlar undir talgilding í samfelagnum.

## 2. Talgildingarbúgvin lóggáva sum heimild til meira munadygga fyrisiting

Talgilding merkir grundleggjandi, at avgerðir kunnu brótast niður til eina røð av smærri tvívalum: 0 ella 1. Hetta hevur stóran týdning fyri talgilding.

Nógvar reglur kunnu nevniliga ikki brótast niður til eitt størri tal av tvítalsvalum og allýsast matematiskt. Skal ein talgild skipan gerast, sum skal kunna umsita hesar reglur, skal innliman/implementering av eini slíkari skipan takast við heilt frá byrjanini av tí politisk-løgfrøðiligu tilgongdini, tá ið lógir verða skrivaðar. Tá er tað alneyðugt, at reglurnar framyvir verða orðaðar soleiðis, at tær júst kunnu brótast niður til ein røð av tvítalsvalum.

Heilt ítøkiliga merkir tað, at ein fullkomin talgilding av lóggávuni krevur, at reglurnar einans innihalda objektiv atlit, sum lættliga kunnu metast binært og á hendan hátt talgildast. Hetta er nógv truplari at gera við subjektivum atlitum, metingum o.tíl. Tí merkir talgildingarbúgvin lóggáva eisini, at gerast má upp við ætl og menniskjaligar metingar. Hetta er ein ræktuliga víðgongd niðurstøða, tí tað er heilt nógvastaðni í galdandi lóggávu, at ætl og subjektivar metingar hava stóran týdning.

Hetta merkir, at longu tá lógaruppskotið verður gjørt, má tað eyðmerkjast og umhugsast, um uppskotið hevur reglur, sum eru ein forðing fyri talgilding. Tað er neyðugt beinanvegin at taka støðu til, um lóggávan skal orðast soleiðis, at hon er búgvin til talgilding, og eisini má beinanvegin umhugsast, hvussu lóggávan skal verða gjørd talgilt.

Í roynd og veru eru heilt ella lutvíst sjálvvirkandi KT-skipanir á nærum øllum fyrisitingarøkjum. Slíkar skipanir eru tó serliga vælegnaðar á málsøkjum, sum í stóran mun eru grundað á matematiskar útrokningar ella aðrar dátur, sum kunnu skamtast, tvs. gerast um til støðd, ið kann verða mátað.

Hetta er t.d galdandi, tá útrokningar verða brúktar sum grundarlag fyri at krevja pening frá borgarum (t.d. við sjálvvirkandi skattaálíkning, innheinting o.tíl.) og sum grundarlag fyri at veita borgarum pening (t.d. útgjalding av almannaveitingum).

## 3. Lóggáva, sum stuðlar undir talgilding í samfelagnum

Tá vit tosa um talgildingarbúna lóggávu, skilt sum lóggáva, sum ger, at samfelagið kann talgildast, er talan um nakað heilt annað enn nevnt frammanfyri. Tá er denturin ikki á, um lóggávan kann umsitast talgilt, men hvat stendur í lógini, tvs. tað tilfarsliga innihaldið í lógini.

Byrjanarstøði fyri at brúka nýggja tøkni er sjálvandi, at hetta ikki stríðir ímóti galdandi reglum. Talgildingarbúgvin lóggáva kann eisini merkja, at lóggávan ikki forðar fyri, at samfelagið brúkar teir møguleikar, sum talgilding hevur við sær.

Um lóggávan ikki skal forða fyri møguleikum og tøkni, sum enn ikki er kend, so má lóggávan skrivast soleiðis, at hon ikki er knýtt at tøknini, sum verður brúkt beint nú. Lógin skal við øðrum orðum vera tøknipartleys. Um lóggávan ikki er tað, kann hetta gerast ein møgulig forðing fyri talgilding og fyri, at samfelagið kann brúka nýggja tøkni. Tessvegna er tøknipartloysi ein neyðug fyritreyt fyri talgildingarbúna lóggávu.

## 4. At umhugsa talgilding í sambandi við lóggávuarbeiði

Longu tá ið eitt lógaruppskot verður gjørt, eigur tú at tryggja tær, at eisini møguleikin fyri talgilding verður tikin við og væl lýstur í lógaruppskotinum. Hetta merkir ikki neyðturviliga, at orð sum “talgilding” ella “KT” skulu standa beinleiðis í lógini. At umhugsa talgilding inn í lóggávuarbeiðið er eisini at skriva lógartekstin soleiðis, at orðaljóð og avleiðingarnar av lógini ikki forða fyri møguleikanum at talgilda nú ella seinni. Tað snýr seg um at orða seg tøkni- og tilgongdarpartleyst.

Í hesum sambandi er viðkomandi at hava hetta í huga:

1) Einfaldar og greiðar reglur eru lættari at skilja hjá borgarum og virkjum, eru lættar at umsita og stuðla undir eini einsháttaðari umsiting og møguleika fyri talgilding.
2) Talgilt samskifti. Er tað ynskiligt, at alt ella partur av samskiftinum við borgarar og virkir skal vera talgilt? Er heimild fyri hesum kravi?
3) Er tað ynskiligt, og ber til at gera málsviðgerðina sjálvvirkna. T.d. at tað í lógini í minst møguliga mun skal verða ásett, at avgerðir verða tiknar sambært ætli og subjektivum metingum.
4) Kunnu upplýsingar/dátur, sum aðrir myndugleikar longu hava savnað inn, brúkast í staðin fyri at savna upplýsingarnar umaftur? T.d. ymiskar grundupplýsingar, sum tað almenna longu skrásetir, t.d. um bústað, fólk, virkir, sjálvsagt við virðing fyri lóggávuni um persónupplýsingar.
5) Trygga og fullgóða dátuviðgerð. Talgilding krevur, at dátutrygdin verður raðfest frammalaga. Í nýggjari lóggávu má umhugsast væl, hvussu nýggja lóggávan tryggjar eina trygga og fullgóða viðgerð av dáta hjá borgarum og virkjum.
6) Eru tað almennar felags KT-loysnir og fyrimyndir, sum kunnu brúkast í staðin fyri at menna egnar loysnir? T.d. Talgildi samleikin, Mínboks, Heldin, skipanir hjá Gjaldstovuni o.tíl.
7) Ber til at forða fyri feilum og sviki? T.d. verður tað í lógaruppskotinum lagt upp fyri at kunna hava talgilt eftirlit við, at upplýsingar, sum eru grundarlag fyri útgjaldingum, eru rættar.

## 5. Fyrisitingarlig krøv til KT-skipanir hjá tí almenna

Danski umboðsmaðurin hevur viðgjørt fleiri mál, har KT eisini hevði ein týðandi leiklut, og har tað varð staðfest, at KT-skipanirnar ikki lúku tey fyrisitingarligu krøvini. Umboðsmaðurin vísti á, at hesi krøv galda, uttan mun til hvussu ein fyrisitingarmyndugleiki umsitingarliga velur at loysa eina uppgávu. Tær vanligu fyrisitingarrættarligu reglurnar, sum myndugleikin skal halda, eru eisini galdandi, tá ið telda kemur í staðin fyri pappír.

Tað er ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum myndugleika, at tess skipanir lúka fyrisitingarrættarlig krøv. Hetta er ábyrgd myndugleikans eisini, um ein eindarskipan er vald, sum vísir seg ikki at vera nøktandi, ella um KT veitarin als ikki bjóðar skipanir, sum kunnu lúka krøvini.

### 5.1. Álítandi avrit og varðveiting av teimum

Tað er eitt treytaleyst krav, at í einum máli skal ein myndugleiki antin hava avrit av skjølum, sum myndugleikin hevur gjørt, ella skal tað í telduni bera til trygt og skjótt at fáa eina fullkomuliga sanna útskrift (svarandi til avrit) av skjalinum. At myndugleikin hevur valt at brúka elektroniskan miðil í staðin fyri pappír, gevur ikki myndugleikanum rætt til at leggja eitt skjal burtur fyrr, enn um tað hevði verið á pappíri.

Treytirnar til eitt *álítandi avrit*, sum myndugleikin hevur skyldu at goyma, eru, at útgangandi skriv antin skulu goymast sum verulig avrit av skrivinum ella í elektroniskari útgávu, sum fullkomiliga samsvarar við frumritið, og har tað sæst, hvør hevur undirskrivað brævið. Tað er ikki neyðugt, at elektroniska útgávan hevur avrit av sjálvari undirskriftini, men tað skal við vissu kunna síggjast, hvør hevur undirskrivað frumritið.

Um myndugleikin bara samskiftir talgilt, skal álítandi avrit eisini varðveitast, soleiðis at teldubrævið antin verður goymt sum ein útskrift ella í elektroniskum formi.

## 5.2. Falsloysiskrøv til skjøl, sum verða send elektroniskt

Tað er eitt minstakrav, at innihaldið í teimum skjølum, sum ein myndugleiki sendir borgarunum elektroniskt, ikki skal kunna verða broytt, eftir at tað er sent.

Umboðsmaðurin vísti til eitt dømi, har myndugleikin hevði sent borgaranum avgerð sína sum vanliga word-fílu. Tað hevði við sær, at avgerðin broytti dagfesting, hvørja ferð skjalið varð latið upp, og at innihaldið í skjalinum kundi vera broytt, tá ið skjalið varð latið upp.

Eitt skjal, sum skal sendast elektroniskt, eigur heldur at verða sent sum pdf-skjal, ella tað kann umskapast til eina mynd og sendast í góðkendum myndasniði, t.d. sum tiff-fílur. Hetta forðar fyri, at skjalið av sær sjálvum broytir dagfesting, hvørja ferð tað verður latið upp, eins og tað forðar fyri, at tað kunna verða gjørdar óætlaðar broytingar í skjalinum.

## 5.3. Leitimøguleikar og skrásetingar í KT-skipanum

Fyrisitingarligar KT-skipanir skulu gerast soleiðis, at tað ber til at finna viðkomandi mál eftir innihaldsligum eyðkennum. Ein myndugleiki skal lúka ta fyrisitingarligu líkagrundregluna, og tað kann hann bert, um tað ber til at finna fram fyrr viðkomandi mál, og um myndugleikin annars hevur eitt nøktandi yvirlit yvir sína egnu siðvenju.

Eisini skulu skrásetingarnar í KT-skipanunum hjá myndugleikunum vera greiðar og nøktandi. Víst varð á dømi, har myndugleikin í teiginum "brævadagfesting" skrásetti, hvønn dag myndugleikin hevði móttikið brævið, meðan dagfestingin á sjálvum brævinum ikki var skrásett. Hetta var ikki nøktandi.

## 5.4. Undirskrift, dagfesting, sendaraheiti, avgreiðsla og sending av skrivum

Í ávísum førum hevur tað avgerandi týdning, at tað er sonn skjalfesting fyri, nær ein myndugleiki hevur sent eitt bræv. Hetta er t.d. galdandi í sambandi við útrokning av freistum, m.a. kærufreistum. Við útrokning av kærufreistum má kunna vera roknað við, at avgerðir hjá myndugleikum verða sendar tann dagin, tær eru dagfestar. Myndugleikar mugu tí gera skipanir og mannagongdir viðvíkjandi dagfesting og sending av brøvum við hesum í huga.

Øll avgerðarskriv frá einum myndugleika eiga at vera undirskrivað. Tað er ikki neyðugt, at avgerðarskrivini eru undirskrivað í hond; tað kann eisini vera ein ljósprentað eftirmynd av undirskriftini, sum verður sett elektroniskt inn í skrivið. Tað eru fleiri orsakir til kravið um undirskrift í avgerðarmálum. Ein embætislig ábyrgd skal kunna staðfestast. Tað skal kunnu síggjast, at avgerðin er tikin av einum málførum starvsfólki, og at talan er um eitt endaligt skjal og ikki eitt uppskot. Undirskriftin forðar fyri falsking, og móttakarin av skrivinum skal kunna meta um, hvørt undirskrivarin er ógegnigur.

Eitt enn meira grundleggjandi krav enn undirskriftakravið er, at tað skal kunna síggjast, frá hvørjum myndugleika ein fráboðan stavar.

Í sambandi við val av t.d. elektroniskum postskipanum eigur myndugleikin at tryggja sær, at postskipanin er gjørd soleiðis, at hon lýkur grundleggjandi fyrisitingarlig krøv um, at ein fráboðan frá einum myndugleika skal hava rætta sendaraheitið.

## 5.5. Partsumboðan

Tá ið ein myndugleiki samskiftir við ein borgara í einum máli, skal borgarin hava møguleika fyri at lata seg umboða av øðrum sbrt. Fyrisitingarlógini § 8. Eisini um samskifti fer fram elektroniskt.

Rætturin til partsumboðan kann játtast við, at myndugleikin ger KT-skipanina soleiðis, at tað ber til hjá einum at brúka skipanina vegna ein annan, ella at tað ber til at fáa undantak um elektroniskt samskifti, um viðkomandi vil lata seg umboða av einum øðrum.
Eisini eigur KT-skipanin at kunna borgarar um møguleikan at lata seg umboða av øðrum, og um møguleiki er at fáa undantak frá at brúka elektroniskt samskifti.

## 5.6. Fráboðan av avgerðum og skyldbundnar talgildar áheitanir frá borgara til myndugleika

Ein borgari, sum er partur í einum máli, skal hava fráboðan beinleiðis um avgerðina, tá ið myndugleikin hevur tikið avgerð í málinum. Hetta er eisini galdandi í teimum førum, tá ið t.d. ein annar myndugleiki hevur søkt um t.d. ávísan stuðul til ein borgara. Tá er tað ikki nøktandi, at avgerðin einans verður send myndugleikanum, sum sendi inn umsóknina.

Ein myndugleiki kann ikki av sær sjálvum krevja, at borgarar skriva elektroniskt til teirra. Hetta krevur beinleiðis heimild í lóg. Tað krevst eisini beinleiðis heimild í lóg at krevja, at borgarar skulu brúka eina talgilda sjálvavgreiðsluskipan, tá ið teir venda sær til myndugleikarnar.

## 5.7. Menning av nýggjum KT-skipanum hjá myndugleikum

Tá ið ein myndugleiki ger nýggja KT-skipan, skal myndugleikin tryggja sær, at skipanin verður gjørd soleiðis, at hon lýkur tær fyrisitingarligu treytirnar. Umboðsmaðurin vísti á, at hann í fleiri førum, har KT-skipan varð brúkt til hópumsiting, hevði sæð, at grundleggjandi fyrisitingarlig krøv vóru skúgvað til viks.

Ein fullfíggjað lýsing av, hvussu fyrisitingarligu krøvini verða hildin í nýggju KT-skipanini, eigur at vera gjørd skjótast til ber, og áðrenn skipanin partvíst verður sett í rakstur. Undir menningini av nýggju KT-skipanini skal støðugt skjalfestast, at skipanin lýkur fyrisitingarligu krøvini.